

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 02 - 2012

# Grønlendingar ósamdir um avgjøld á ráevni

Í Grønlandi hevur andstøðuflokkurin Siumut skotið upp, at oljufeløg og onnur feløg, sum útvinna ráevni í Grønlandi, skulu rinda sokallað royalty-avgjald. Flokkurin heldur málið vera so umráðandi, at hann hevur mælt til, at Landstingið verður kallað saman til eina eykatingsetu at broyta galdandi skattareglur á ráevnaøkinum. Flokkurin sigur tað vera neyðugt at broyta reglurnar nú, tí fleiri feløg bíða eftir góðkenning, Men landsstýrismaðurin í tilfeingismálum, Ove Karl Berthelsen, ávarar um, at eitt tílíkt avgjald fer at ræða tey útlendsku feløgini burtur. -Námsfeløgini velja tey lond, har tað lønar seg best at útvinna ráevni, og eru vit ikki kappingarfør, kunnu vit enda sum eitt menningarland í hesum høpi, sigur Ove Karl Berthelsen við grønlendska kringvarpið, KNR. Hann er ikki í iva um, at ein skipan við royalty-avgjaldi verður dýr fyri Grønland. -Vit hava heilt konkretar verkætlanir á námsvinnuøkinum, sum eru komnar væl áleiðis, ið hava givið okkum ábendingar um, at verða viðurskiftini óstøðug, verða verkætlanirnar steðgaðar, og feløgini fara at lata síni kanningarloyvi innaftur, sigur landsstýrismaðurin við KNR.